**Tjóðveldi**
**Javnaðarflokkurin**
**Framsókn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 159/2011: Uppskot til samtyktar um at seta § 25 nevnd at gera fiskivinnunýskipan**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at seta eina § 25 nevnd, sambært Tingskipanini, við umboðum fyri allar flokkar á tingi, ið skal gera uppskot til nýggja skipan fyri føroysku fiskivinnuna, ið skal verða galdandi frá 1. januar 2018.

**Viðmerkingar**
Allir flokkar á Løgtingi ynskja at skapa tryggar karmar um føroysku fiskivinnuna. Hóast hetta, so eru meira enn 4 ár nú gingin, uttan at samlaða politiska skipanin er komin við greiðum boði uppá, hvørjar karmar fiskivinnan skal virka innan í framtíðini.

Nú øll fiskiloyvi ganga út í 2018, er neyðugt, at nýggj skipan verður gjørd sum skjótast, soleiðis at fiskivinnan fær greið boð um framtíðar karmarnar.

Fiskivinnan er ein av grundsúlunum undir føroyska samfelagnum, og er alneyðugt, at teir karmar, ið verða um vinnuna, verða góðir og støðugir. Skal hetta tryggjast, er neyðugt við eini fiskivinnunýskipan, ið hevur breiða undirtøku á Løgtingi.

Tí eigur § 25 nevnd at verða sett við umboðum frá øllum politiskum flokkum á Løgtingi, ið – saman við góðari ráðgeving frá fiskivinnuni, serfrøðingum og øðrum – skal gera uppskot til nýggja skipan fyri føroysku fiskivinnuna.

Ein fiskivinnunýskipan, ið skal verða til gagns fyri fiskivinnuna, alt tað føroyska samfelagið, og tryggja føroyingum eina burðardygga fiskivinnu bæði lívfrøðiliga og fíggjarliga frá 1. januar 2018. Mælt verður til, at nevndin verður liðug við arbeiðið sítt á heysti 2012.

**Á Løgtingi, 29. februar 2012**

Høgni Hoydal    Aksel V. Johannesen    Poul Michelsen